# Vilja kanna møguleikan at gera tunnil undir Havnini



**Í næstu viku verður uppskot lagt fyri Løgtingið um at gera tunnil samanbinda Hvítanesvegin og Oyggjarvegin við tunli undir Havnini**

ØÐRVÍSI VEGAGERÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Møguleikin at gera tunnil undir Hoyvíkshagan í Havn, eigur at verða kannaður.

Tað halda tey bæði, Katrin Dahl Jakobsen og Kristian Magnussen, úr javnaðarflokkinum.

Mikudagin fara tey at leggja uppskot fyri Løgtingið um at heita á landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri, hvussu innkoyringarvegurin til Havnar av Hvítanesvegnum kann gerast.

Hesar kanningarnar skulu lýsa fyrimunirnar og vansarnar við ymsum møguleikum, tá ið dentur verður lagdur á samferðsluviðurskifti, fíggjarlig-, mentanarlig-, umhvørvislig- og sosial viðurskifti.

Tá ið málið er kannað, skal Landsstýrið skriva eina frágreiðing um málið og leggja hana fyri Løgtingið.

Tað, sum liggur í hesum er, at tey vilja kanna um tað ikki ber til at leggja vegin úr Hvbítanesvegnum í Oyggjarvegin, ella ein part av honum í ein tunnil, heldur enn at gera vanligan veg alt strekkið.

## Góður hugburður steðgar í Havn

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at tá ið Kollafjarðartunnilin varð gjørdur, kom Hvítanesvegurin at gerast høvuðsvegurin til og úr Havnini.

– Í eini 20 ár hevur ein ætlan verið í umbuna fyri at gera ein ytri ringveg um Havnina, úr Hvítanesvegnum í Oyggjarvegin, fyri at bilar skulu fáa fleiri møguleikar at koyra oman í Havnina, alt eftir, hvar teir skulu.

– Síðani er nógv hent á samferðsluøkinum. Tunnil er gjørdur vestur í Vágar og nú verður tunnil gjørdur til Klaksvíkar.

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at Ongastaðni í landinum er so nógv fersðla eftir einum landsvegi sum eftir Hvítanesvegnum og sum gongdin er, kann ikki væntast annað enn at ferðslan fer at verða munandi økt, so hvørt sum oyggjarnar verða bundnar saman og samferðslukervið annars, batnar.

Hon vísir eisini á, at í sambandi við Norðoyartunnilin, verður tosað um at gera tunnil undir Leirvíkar bygd.

– Alt hetta vísir, at í sambandi við samferðslu, verður meiri og meiri hugsað um, hvussu alt ferðslukervið kann skipast sum eitt samanhangandi net, til so lítlan ampa sum gjørligt, bæði fyri nattúru og fólk annars.

Men hon sigur, at tvíverri steðgar hesin hugburður í Havnini .

Katrin Dahl Jacobsen sigur, at ætlaði vegurin úr Hvítanesi í Oyggjarvegin er mettur at kosta 65-70 milliónir.

– Hetta er nógvur pening fyri eina loysn, sum als ikki er nøktandi og sum enn minni hoyrir nútíðini til.

Hon sigur, at í veruleikanum kemur hesin ringvegurin at liggja í bygdum øki, í hvussu so er, heilt skjótt, tí Havnin veksur alla tíðina.

Og verður hesin vegurin gjørdur, kemur Havnin at verða innistongd í allar ævir av einum rinvegi.

– Endamálið við hesum vegastrekkinum, var at leggja ein ringveg uttanum bygt øki, tí verður hetta nevnt ein ytri ringvegur. Men tað er ikki rætt. Hetta verður ikki nakar ytri ringvegur, ti hann kemur at ganga mitt ígjøgnum bygt øki sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Avleiðingin verður eisini, at ein stórur partur av teimum traðum, sum eru eftir í Havn, verða lagdar undir asfalt.

– Tí halda vit, at møguleikinfyri tunli eigur at verða kannaður, áðrenn spakin verður settur í,sigur Katrin Dahl Jakobsen.

# Ein søgulig hending fyri Annitu og alla Suðuroynna

**Nú verður farið undir arbeiðið at byggja nýggjan miðnámsskúla í Suðuroy. Skúlin verður liðugur á sumri 2006**

SKÚLABYGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Vitan er lykilin til framburð og menning og meiri vit vita, betri eru vit før fyri at átaka okkum tær ókendu avbjóðingarnar, sum eru fyri framman so at vit vera før fyri, ikki bara at yvirliva, men at liva,segði Annita á Fríðriksmørk, tá ið hon loysti fyrsta flagið til nýggja miðnámsskúlan í Suðuroy*

Hósdagurin 18.september 2003 var ein søguligure dagur - bæði fyri Annitu á Fríðriksmørk, landsstýriskvinnu í mentamálum, og fyri alla Suðuroynna.

Hendan illsliga heystardagin var tað fallið henni í lut at loysa fyrsta flagið til nýggja miðnámsskúlan, sum skal byggjast í Suðuroynni.

Hetta er fyrstu ferð í mannaminni, at so stór almenn bygging er í Suðuroynni. Hetta var samstundis fyrsta almenna uppgávan hjá nýtilnevndu landsstýriskvinnuni í mentamálum og tí kann ikki sigast annað enn at hetta er bæði ein søgulig hending og ein stórhending.

Og tað vóru tað mong sum hildu, tí rættiliga fitt av fólki var komið saman á fløtuni vesturi á Hamrabøi, har skúlin skal byggjast.

## Ein vitanar og mentanardepil

Áðrenn Annita á Fríðriksmørk loysti fyrsta flagið við tí silvurlagda hakanum frá Tórgerð Suðuroy, segði hon, at við einum nýggjum skúla verða fortreytir skaptar fyri trivnaði og menning í Suðuroynni.

Hon segði, at hetta verður mest framkomni miðnámsskúli í landinum og at við hesum skúla, fekk Suðuroyggin ein stoltleika, sum fer at ávirka samfelagið tann góða vegin.

Hon nevndi eisini, at skúlin verður bygdur eftir uppskotinum, sum vann fyrstu virðisløn í eini arkitektakapping.

– Sostatt hava vit víst, at í hesum føri vildu vit hava tað besta.

Men umframt at vera skúli, har tað ber til at hava framkomna undirvísing, verður hetta eisini samkomuhøll, har tað ber til at hava sjónleik, konsertir, fundarvirksemi og onnur mentanarlig tiltøk. Men í bygninginum verður eisini eitt sera framkomið meginbókasavn fyri alla Suðuroynna

– Hetta verður ein vitanardepil og ein mentanardepil fyri alla Suðuroynna, har fyrst og fremst næmingarnir, men eisini suðuroyingar annars, eru saman at hvessa sær vitið.

– Hetta er eitt stað, sum hevur til endamál at fáa fólk at ivast, at hugsa og sum verður bygt við víðskygni og hetta er eitt eindømi í føroyskari skúlabygging.

Hon helt eisini, at tað er hugaligt, at fólk trúgva uppá, at samfelagið verður ment í síni heild, tá ið lokalir upplýsingar- og útbúvingarmøguleikar mennast.

Hon nevndi eisini, hvønn týdning upplýsing hevur.

– Bara vitan kann gera fólk før fyri at meta um umheimin við kritiskum og kannandi eygum.

– Við at styrkja møguleikarnar fyri upplýsing og útbúgving, eru vit eisini við til at styrkja fólkaræðið, segði Annita á Fríðriksmørk.

– Vitan er lykilin til framburð og menning og meiri vit vita, betri eru vit før fyri at átaka okkum tær ókendu avbjóðingarnar, sum eru fyri framman so at vit vera før fyri, ikki bara at yvirliva, men at liva.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági læt ongan iva verða um, at hetta var ein stór løta fyri Suðuroynna og hann vísti á, at sum er, húsast skúlin undir sera trongum umstøðum.

Hann vísti, at hetta er eitt sera framkomið byggiverk, sum bæði í útsjónd og innihaldi brýtur upp úr nýggjum.

– Eiði í Vági er eitt søguligt pláss, sum hevur verið karmur um nógva ymsa mentan. Her er nógv velt upp ígjøgnum tíðirnar, her róði vágbingar út, á Vatninum hava fólk stuttleika sær á skoytum og á sparkarum tá ið tað frysti og hvønn dag gongur riðil av fólki framvið á veg vestur á fótbóltsvøllin og VB húsið.

– Og nú verður so enn ein velta velt, segði Borgarstjórin í Vági.

## Liðugur í 2006

Og nú tað fyrsta flagið er loyst, verður farið at grava út. Tilboðini uppá útgrevsturin eru við at koma inn og um ein mánaða byrjar útgrevsturin.

Næsta summar, ella næsta heyst verður sjálvt arbeiðið at byggja skúlan, boðið út, sigur Claus Reistrup á Mentamálaráðnum.

Hann sigur, at eftir ætlanini, verður skúlin liðugur at taka i nýtslu á sumri 2006. Skúlin kann hýsa 150 næmingum og hann kostar einar 45 milliónir. Men afturat tí skal eitt meginbókasavn fyri Suðuroynna gerast á skúlanum og tað kostar góðar fimm milliónir afturat, so tilsamans er talan um eina bygging upp á góðar 50 milliónir.

Tilsamans verður húsið 2800 fermetrar stórt. Av teimum verður sjálvur skúlin 2100 fermetrar og Meginbókasavnið verður 700 fermetrar.



# Gomlu Kuba-trolararnir hava hall í ár

**Tað eru næstan 20 ár, síðan upsaprísurin hevur verið so vánaligur sum í ár.**
**- Gomlu Kuba-trolararnir koyra við "reyðum" tølum og tey nýggju, Bakur og Stelkur, geva heldur einki yvirskot sum er, sigur Ragnar Olsen, sum starvast hjá P/F Beta.**
**Hann heldur tó, at ábendingar eru um, at upsaprísurin hevur hug at "lætta" sær eitt sindur nú í heyst**



FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*

Tað gongur ikki væl hjá partrolarunum, sum veiða upsa. Prísurin í ár hevur verið so lágur, sum hann ikki hevur verið í næstan 20 ár. Vit skulu nevniliga heilt aftur til 1984 fyri at finna líka lágar miðalprísir á upsa sum teir, vit hava havt í ár. Haraftrat kemur, at upsin í dag er ein nógv størri partur av veiðini hjá hesum trolarum, enn hann var í 1984.

## Miðalprísur: 3,59

Ragnar Olsen, sum starvast hjá P/F Beta, sigur, at miðalprísurin á upsa higartil í ár hevur verið 3,59 kr. fyri kilo.

- Hetta er galdandi fyri upsan, sum skipini hjá okkum hava fiskað í ár, sigur hann.

Ragnar vísir á, at vit skulu heilt aftur til 1984 fyri at finna ein lægri miðalprís á upsa. Í 1984 var miðalprísurin nevniliga 3,41 kr. fyri kilo.

P/F Beta hevur rættiliga neyv veiði-og príshagtøl.

- Í 1979 var miðalprísurin á upsa 2,59 kr. fyri kilo, og í 1980 var hann 3,16.

Ragnar sigur, at eitt skifti í nítiárunum, árini 1993-1994, var upsaprísurin eisini ógvuliga lágur; tá lá hann um 3,70 kr. fyri kilo.

- Men vit skulu so næstan 20 ár aftur í tíðina fyri at finna so lágar miðalprísir sum higartil í ár, sigur hann.

## Størri partur

Í 1979 og 1980, tá ið prísirnir vóru í botni, var upsin eini 60% av veiðini hjá trolarunum. Árini 1993 og 1994, tá ið prísirnir eisini vóru sera lágir, taldi upsin 83-85% av veiðini.

- Higartil í ár er parturin av upsa eini 85%, sigur hann.

Ragnar vísir á, at góðu toskaárini, 1996 og 1997, fall upsin niður á stívliga 50% av veiðini, tí so nógvur toskur var at fáa á upsaleiðunum.

- Besta upsaprísin fingu skipini í 1998; tá var miðalprísurin 7,65 kr. fyri kilo, men hetta árið var heldur ikki so nógvur upsi at fáa, sigur hann.

## "Reyð" tøl…

Ragnar ásannar, at tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá Beta-skipunum higartil í ár, hann heldur, at vónir eru um, at tølini fara at rætta seg uppaftur, sum árið líður.

- Men so skal eisini ein rættilig prísbroyting henda við upsanum, sigur hann.

Teir gomlu Kuba-trolararnir hava koyrt við "reyðum" tølum higartil í ár, meðan tey nýggju skipini hava klárað seg heldur betur.

- Raksturin av teimum gomlu skipunum hevur givið hall, meðan tølini hjá teimum nýggju skipunum liggja á 0. Hallið hjá gomlu skipunum er tó ikki so stórt, men tað er har.

Ragnar vísir á, at batar eru at hóma í upsaprísinum, nú heystið er komið, og hetta er eisini vanligt hesa tíðina av árinum.

- So, hóast gongdin hevur verið heldur vánalig higartil í ár, vóna vit, at vit kortini hava "botnin" aftan fyri okkum, sigur hann.

## Til garantieftirlit

Bert tríggir mánaðir eru eftir av árinum, og í hesum tíðarskeiði skulu nýggju Beta-skipini til garantieftirlit í minsta lagi 14 dagar.

- Í løtuni verður arbeitt við, um eftirlitið kann gerast í Føroyum – ella, um neyðugt verður at fara til Spaniu við skipunum, har tey eru bygd.

Ragnar Olsen sigur, at ætlanin er eisini at gera slengrikjølar undir skipini, tá ið tey fara til garantieftirlit, helst einaferð í november.

- Verður eftirlitið gjørt í Spaniu, er greitt, at skipini verða úr vinnu í meira enn 14 dagar, sigur hann.

At enda kunnu vit skoyta uppí, at upsaprísirnir hava verið serliga lágir í juni, juli og august.

# Alment innlit í undirskriftirnar

**Hósvíkar kommuna er biðin um alment innlit í samband við áheitanina, sum fólk í bygdini undirskrivaðu og handaðu kommununi um samanlegging**

ATKVØÐA OG STRÍÐ

*Vilmund Jacobsen*

Líkt er ikki til, at stríðið, sum hevur tikið seg upp, hvørt Hósvíkar kommuna skal verða við í komandi Sunda kommunu ella ikki, er av, hóast tvær fólkaatkvøður hava verið um málið.

Á fyrru fólkaatkvøðuni, sum var í mai, vóru 10 fleiri nei-sigarar enn ja-sigarar og á fólkaatkvøðuni, sum var seinasta leygardag, vóru 5 fleiri ja-sigarar enn neisigarar. Kortini vóru tveir nei-sigarar fleiri seinast enn á atkvøðugreiðsluni í mai.

## Fólk undrast

Sosialurin hevur frá álítandi keldum í Hósvík fingið at vita, at onkur teirra, sum ikki tekur undir við, at Hósvíkar kommuna fer uppí Sunda kommunu í løtuni, hevur biðið um og fingið alment innlit í, hvør skrivaði undir áheitanina á kommununa um at fara uppí Sunda kommunu.

- Vit skilja ikki endamálið við hesum, og vit stúra fyri avleiðingunum, nú nei-sigarar fáa útleverað nøvnini á øllum teimum, sum heittu á Hósvíkar kommunu um at fara uppí eina komandi Sunda kommunu.

Soleiðis siga fólk í Hósvík, sum hava vent sær til Sosialin.

## Jógvan váttar

Sosialurin hevur vent sær til Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformann í Hósvík, sum váttar, at biðið er um alment innlit í hesi viðurskifti, og at kommunan sambært fyrisitingarlógini hevur latið tilfarið av hondum.

Hann hevur annars ongar viðmerkingar til málið.

Í samrøðu við Sosialin í vikuni, segði Mikkjal Hansen, sum alment hevur givið til kennar, at hann ikki er fyri eini samanlegging í løtuni, at "bygdarsálin í Hósvík er knúst…"

- Vit, sum søgdu ja at fara uppí eina komandi Sunda kommunu, spyrja nú okkum sjálvi, um bygdarsálin verður bygd uppaftur við at fara eftir okkum, sum atkvøddu fyri samanlegging.

Fólk í Hósvík, sum hava vent sær til blaðið, spyrja og undrast yvir, hvat endamálið er við at biðja um nøvnini á teimum, sum skrivaðu undir.

# Birgir og familjan skipa fyri Vørumessuni

**- Hetta er eitt stórt tiltak, og nógv viðurskifti skulu fáast uppá pláss, men vit eru fleiri um at taka tøkini. Vit ganga øll við lív og sál upp í, at alt er komið uppá pláss, tá ið messan letur upp.**
**Birgir Poulsen, stigtakari, sigur, at fyrireikingarnar soleiðis eru meira eitt spæl enn ein byrða**

VØRUMESSAN 2003

*Vilmund Jacobsen*

- Firmaið Marknaðarføring, sum skipar fyri Vørumessuni, er faktiskt ein familjufyritøka, sigur Birgir Poulsen, tá ið vit spyrja hann, hvør hjálpir honum at fyrireika og skipa fyri tí stóra tiltaki, sum ein slík sølustevna er.

Hann sigur, at tað er hann sjálvur, konan, Lis, teirra trý børn og tveir versynir, sum standa fyri meginpartinum av tí praktiska, nú sætta Vørumessan í røðini fer av bakkastokki fríggjamorgunin.

## Eitt spæl…

Spurdur, um hetta ikki er eitt stórt tak, sigur stigtakarin:

- Jú, hetta er eitt stórt tiltak, og nógv viðurskifti skulu fáast uppá pláss, men vit eru fleiri um at taka hesi tøkini. Vit ganga øll við lív og sál upp í, at alt er komið uppá pláss, tá ið messan letur upp.

Birgir sigur, at fyrireikingarnar soleiðis eru meira eitt spæl enn ein byrða.



*Tað er Birgir Poulsen, konan Lis, børn og versynir, sum taka sær av øllum tí praktiska í sambandi við Vørumessuna*

- Vit hava Dekostovuna, sum tekur sær av básaskipanini, og onkur framsýnari keypir sær eisini serstaka hjálp til sín bás.

Hann sigur, at tá ið øll familjan er í gongd og hjálpir til, er ikki neyðugt við nakrari serligari hjálp aftrat.

- Í gongini verður móttøkubásurin, sum verður mannaður við trimum fólkum, tá ið messan er opin. Aftrat hesum verða trý fólk í høllini at vera framsýnarunum til hjálpar. Øll hesum taka vit okkum av sjálvi, sigur Birgir.

## Starvast hjá Merko

Dagliga arbeiði hjá honum er á Merko, har hann virkar sum stjóri og samskipari. Skrivstovan er í ovaru hæddini í bygninginum á Toftum, har handilin hjá Pidda er.

- Eg taki mær serliga av tilboðunum, sum handlarnir kring landið hava og í ein ávisan mun av innkeypi. Annars keypa handlarnir allar tær dagligu vørurnar sjálvir.

Birgir sigur, at Merko er ein føroysk fyritøka ella handilsketa, sum 9 miðalstórir handlar eiga.

- Vit handla nógv við føroyskar heilsølur, sum í nógvum førum eru kappingarførar. Ein av útlendsku leverandørunum, sum Merko eisini keypir nógvar vørur frá, er Edeka í Danmark.

## Útboð og kappingarføri

Birgir Poulsen sigur, at útboðið verður størri og kappingarføri betur, tá ið keypt verður inn í felagsskapi.

- Samstarvið ger, at vit kunnu keypa inn á nøkulunda sama støði, sum teir stóru handlarnir í Føroyum, sigur hann.